VIÐMERKINGAR

Barnagar›ar

Tórhallur Áslaksson
valevni Tjó›veldisflokksins

Í barnagar›i ynski eg, at sleppa at ganga beinan veg, men har er ikki pláss fyri mær, so eg kann ikki fylgjast vi› tær!

Or›ini sang Hjørdis Johansen fyri nógvum árum sí›ani, men sangurin er framvegis líka aktuellur, ella uppaftur meira aktuellur í dag.

Foreldur vilja hava fleiri barnagar›ar, kommunan roynir at loysa plásstroti›, landsst‡ri› vil bert lata kommununa ger›a íløgur fyri eitt ávíst krónutal og sjálvt um Tórshavnar b‡rá›, undir lei›slu tjó›veldisfloksins, hevur økt tali› á ansingarplássum vi› 400, eru 400 børn í sama tí›arskei›i komin afturat á bí›ilistan.

Er hettar skrúvan uttan enda ella hvat?

Hvussu kann b‡rá›i› útvega nokk av ansingarplássum, kann b‡rá›i ger›a hettar einsamalt ella eru fleiri i› skulu ver›a felags um at útvega ansingarplássini. Sjálvur haldi eg ta› ver›a gott hugskot at størri arbei›spláss ella samtøk fáa loyvi at ger›a barnagar›ar, men Tórshavnar b‡rá› má hava umsjón og eftirlit vi› at hølisvi›urskifti og pedagogiska innihaldi› eru á tí stø›i hesi eiga at ver›a.

Set tí X vi› eitt av valevnunum á lista E, t.d meg

Landavegurin

Leivur Hansen,
borgarstjóri



Sjúr›ur Poulsen sóknast í fyrispurningi til mín í blø›unum eftir, nær fari› ver›ur undir at brei›ka "tann stubban av vegi, i› eftir er frá brúnni um Rættará eystanfyri Vesturkirkjuna og ni›an í Frælsa vegin".

Svari› er, at sambært ra›festingunum hjá teknisku fyrisiting kommununnar er ætlanin - um tekniska nevnd og b‡rá›i› annars sum heild tekur undir vi› tí - at fremja arbei›i› næsta ár.

Busslei›in

Maria á Dul,
valevni Fólkafloksins

Bussar út har fólki b‡r og tørvurin er.

Sum ein, i› hevur roynt ta› at búgva sjálv fimta 1 (ein) heilan kilometur frá næsta bussste›giplássi, kenni eg til fulnar truplleikan av, at Busslei›in ikki er ment í takt vi› at b‡urin er vaksin.

Fólkaflokkurin vil, um hann fær ávirkan aftaná b‡rá›svali›, arbei›a fyri at endursko›a Busslei›ina, soleisis at bussarnir koma út til tey øki, sum í dag onki busssamband hava. Hetta er partur av at menna b‡lingsumhvørvini.

Seti› tí X vi› Fólkaflokkin til b‡rá›svali› komandi.

Hví eri eg uppstilla›ur?

Snorri Fjallsbak,
tjó›veldisma›ur, valevni til kommunuvali› í Tórshavnar kommunu



Fyri nøkrum árum sí›an var eg á politiskum fundi í Útvarpshøllini. Brádliga kendi eg á mær, at ta› eisini var mín skyld, at danir enn rá›a í Føroyum. Lova›i, at eg skuldi gera ta›, sum eg kundi, at loysa Føroyar úr donskum hafti, og ta› helt eg meg best gera vi› at melda meg til arbei›is í Tjó›veldisflokkinum.

Tá i› eg upp til hetta b‡rá›svali› ver›i bi›in at stilla upp fyri flokkin, taki eg ta› sum ein part av arbei›num fyri Tjó›veldinum, tí vinna vit Havnina, vinna vit eisini landi›.

Eg haldi, at vit hesa fer› skulu n‡ta b‡rá›svali› at signalera til Føroya Landsst‡ri: Vit tola ikki longur danskt vald, vit vilja halda lei›ina framá móti fullveldinum og loysingini!

Nú máttu ta› sta›i› øllum greitt, at Poul Nyrup Rasmussen aldri fer at skriva undir avtalu, har Danmørk vi›urkennir Føroyar sum fullveldis tjó›. Ei heldur nakar annar danskur forsætisrá›harri. Samrá›ingarlei›in er roynd, hon førir aldri á mál. Vit mugu sjálvi loysa. Seti› krossin vi› lista E.

So nógv gó› fólk hava longu lova› so nógv gott, at einki er eftir hjá mær at lova, einki anna› enn at eg arbei›i í alvára fyri kommununi og fólkinum, framhaldandi fyri landinum og flokkinum.

Til mín gó›a vin Sakaris Hansen

Páll Petersen,
b‡rá›slimur

Eg skal ikki her koma og taka naka› frá tær og tínari grein í Sosialinum 31. okt. 2000, tó má eg koma vi› eini lítlari vi›merking.

Tú skrivar um ein borgara á Hamrinum á Argjum sum hev›i eitt lesarabræv um vegin ni›an á Hamarin, har hann greiddi frá hvussu ringur vegurin var. Undirrita›i las sjálvur bræv›i, meg eg kann vissa Sakaris Hansen, allar borgarar á Hamrinum og a›rasta›ni vi›, at hetta lesarabrævi› var ikki orsøkin til at vegurin bleiv asfaltera›ur, tí hetta arbei›i› var avgjørt frammanundan í Teknisku nevnd, at arbei›i› so bleiv gjørt eina viku eftir at onkur hev›i skriva› um ta› í blø›unum, ta› var av berari tilvild. Fyri greinskrivaran hevur lesarabrævi› veri› skriva› í rættari løtu, tí ta› kann tykjast, fyri uttanfyristandandi, sum um at bræv hansara setti gongd á máli›. Eg siti sjálvur í Teknisku nevnd og kenni væl til hetta máli›.

Nevnast kann eisini, at onnur mál vi›víkjandi Hamarinum, sum Argja kommuna ongantí› fekk gjørt, eisini vóru samtykt.

Kommunuskuldin munandi minka›

Dan Nielsen,
virkandi borgarstjóri, valevni á samgongulistanum – Lista A

Eins og fleiri a›rar kommunur í landinum hevur Tvøroyri nógva skuld at dragast vi›.

Fyri at koma burturúr hesum so skjótt sum gjørligt, er rættuliga stórur partur at skattainntøkuni farin til at gjalda lán ni›ur vi›. Hetta tal hevur veri› umlei› 16 milliónir seinastu 4 árini.

Trey›ugt so tá nógv fer til avdráttir og rentur, so ver›ur okkurt at liggja á láni, ella útskoti eitt sindur. Tó eru glottar fyri framan, tí nú munar rættuliga.

Tá ta› tykist sum ivamál eru um hvør skuldin hjá Tvøroyrar Kommunu er, ver›ur tí komi› vi› fylgjandi uppl‡singum borgarunum til kunningar:

Taka vit ári› 1995 sum eina byrjan, skylda›i kommunan 170 milliónir. Vi› árslok 2000 ver›ur skuldin ni›ri á 130 milliónum. T. v. s., at ni›urgoldnar eru 40 milliónir seinastu 5 árini.

Taka vit so ta ætla›u saneringina uppá umlei› 23 milliónir, ver›ur skuldin at liggja um 108 milliónur vi› árslok 2000.

Fara vit so 4 ár fram í tí›ina t. v. s. árslok 2004, ver›ur mett at skuldin liggur eitt sta› ímillum 60 og 70 milliónir.

At Tvøroyrar Kommuna hevur goldi› so nógv ni›ur av skuldini, hevur ikki veri› uttan avlei›ingar fyri tann einstaka borgaran. Vit hava havt 23 % í skatti - eitt ta› hægsta í landinum.

Í fjør settu vit tó procenti› ni›ur á 22,5 %. Hetta gó›tók landsst‡ri›.

Uppskot er frammi um at var›veita ver›andi skattaprocent, me›an barnafrádrátturin ver›ur naka› hægri enn seinasta ár. Hetta ver›ur gjørt í tí treysti, at kommunan heldur enn fegin vil hava ungar familjur at flyta til Tvøroyrar, og tí vera vi›, saman vi› ver›andi borgarum at mynda framgongdina i› er í bygdini.

Framgongdin sæst vi› at fólkatali er vaksandi aftur. Pr. 30.9.2000, búgva 1829 fólk í kommununi.

VIÐMERKINGAR

Betri vinnu- og virkismøguleikar geva betri barnansing

Høgni Djurhuus
Valevni sambandslistans í Tórshavnar Kommunu



Grundarlagið fyri at fólk kunnu vinna sær eina inntøku her í Havnini, er at umstøðurnar til at seta virki á stovn her eru góðar. Alment virksemi er nógv her, serliga innan fyrisiting. Kommunan stykkjaði fyri nøkrum árum síðani út ymsar staðir í Havnini til Ídnaðarøki. Øll hesi grundstykki eru nú seld, og tey flestu eru í nýtslu, tó í størri an mun til fyrisiting og handilsvinnuna og í ov lítlan mun framleiðsluvinnu.

Tað er tí neyðugt at Havnar Kommuna nú stuðlar framleiðsluvinnuni. Fyrsti og besti møguleiki er nýggj útstykking av smáum grundstykkjum 1000 til 2000 fermetrar. Hesi skulu seljast til framleiðslu og handverkaravirki, so at tey fáa betur arbeiðsumstøður og ikki húsast, sum nú í ymsum hjallarum. Tað er uppaftur meiri umráðandi at hesi viðurskifti eru í lagi, nú oljuvinnan tekur seg upp her um Havnina.

Fyri at skaffa sær nøktandi arbeiðsmegi er tað neyðugt at virkini hjálpa starvsfólki sínum við barnaansingini á sama hátt sum Føroya Tele roynir. Hetta gevur virkiseigaranum betri møguleikar at velja sær sítt arbeiðsfólk og at starvfólkið kennir at arbeiðsplássið hjálpir teimum í øðrum enn bert í tí fíggjarliga. Eisini eru tað arbeiðspláss, sum hava serligan tørv viðvíkjandi barnaansing, t.d. Landssjúkrahúsið, har nógv fólk ganga í vaktum – eisini um náttina. Roynt varð í sjeyti árunum at byrja ein barnaansingarstovn knýttan at sjúkrahúsinum, men hetta var ikki loyvt av landsmyndugleikunum tá. Men nú hevur kommunan ábyrgd av hesum økinum, og tí ber til í samarbeiði við ymisk virki og stovnar, at gera barnsansingina so at hon er meiri hóskandi til arbeiðsfólkið og stovnarnar.

Skulu vit sova á gullinum?

Rani Nolsøe
Klaksvík

Okkara siðaarvur skal verjast. Hetta hoyra vit ikki minst tá hátíðarligar røður vera hildnar, tá merkisdagar eru, ella politiskar visjónir skulu markerast.

Veruleikin er tó tann, at alt ov lítið er gjørt á hesum øki her í Norðoyggjum.

Ein útgrevstur bleiv gjørdur á Borðoyarvík í 1960'unum. Síðani er lítið og onki hent.

Úti í Grøv finst ein víkingatoft. Hvussu nógv vita av, at har er eitt serstakt dømi um okkara fortíð? Norðoya Fornminnissavn er og eigur at verða eitt aktiv fyri okkara kommunu, men sum er hevur tað ongar heimildir at røkja eina veruliga savnsuppgávu.

Klaksvíkar býráð skal hava ein skipaðan mentunnarpolitikk, og hetta eigur eitt komandi býráð av álvara at arbeiða við.

Ein partur av mentunnarpolitikkinum, er at fáa lagt røkt og ábyrgd av eitt nú fornminnum undir kommunala fyrisiting. Hetta er einasti máti at broyta núverandi støðu.

Fornminni skulu handfarast eftir fakligum fortreytum, men tey skulu eisini kunna gerast eitt aktiv fyri nútíðina. Eitt nú hevur víkingatíðin stórt virði aðrastaðni, ikki minst innan ferðavinnuna.

Við at taka fakliga ábyrgd, kunnu vit tilføra forvitnisligt tilfar til okkum sjálvi og ikki minni til ferðavinnuna. Soleiðis menna vit eisini Klaksvíkina og Norðoyggjar sum heild menturnaliga.

Hví skulu vit sova á gullinum, tá siðaarvurin eigur at verða eitt aktiv fyri lokalsamfelagið?

Nú er tað Tú!



Johan Mortensen
Valevni hjá Tjóðveldisflokkinum

Ellindur Patursson, Andrea Árting Sigurð Joensen, Nólsoyar Páll, S.J. Mykines, W Heinesen, Jóannes Patursson, Liffa Gregoriussen, Karsten Hoydal, Mitens, Emil J Thomsen, Hanus V Høgadalsá,

Heðin Brú, Rasmus Effersøe, Janus Djurhuus, John Dam, Símun Av Skarði, D J Vilhelm, Zacharis Á Skipafelagnum, Johan Í Hoyvík, Martin Joensen, H A Djurhuus, Marius Johannesen, Janus Kamban, Regin Dahl, Eiler Jacobsen, Agga Í Garðastovu, Verland Johannesen, Ruth Smith, Próst Dahl, Victor Danielsen, Jákup í Jákupsstovu, Malmberg Simonsen, Magnus Heinason, Hans Pauli Johannesen, Tommy Arge, Hanus Debes Joensen, Páll Nolsøe, Bona, Símun Hansen Jens Pauli Heinesen, Kristian Matrass, Ólavur Mikkelsen Garðamenninir, Esmar Fuglø, Ove Joensen, Martin Holm, Kjartan Mohr, Magnus Á Kamarinum, Leif Mohr, Pauli Dahl, Poul Hansen, Kvívíks Tummas, Siegfred Skaale, Ólavur Á Heygum, M S Við Stein, H J Højgaard, Andrew Sloan, Óla Jákup Jensen, Chr H Jacobsen, JF Kjølbro, Alfred Dahl, Napoleon Á Glyvrum, Kaj Johannesen, DP Danielsen, Ovi Mikkelsen, Johan Weyhe, Zahle, Odfríður Haraldsen, Eiden Muller, Malla Jacobsen, Napoleon Djurhuus, Niels Juel Arge, Kristin Í Geil, Petur Alberg, N J Mortensen, Maria Eide, Poul F…..

Øll hesi bygdu land.

Gerð tú nú tína skyldu við at velja Tjóðveldisflokkin til Býráðsvalið í Tórshavn.

Fríðkan av býnum

Heðin Mortensen
býráðslimur sambandsvalevni til Tórshavnar býráð
Heimasíðan: www.hemorten.com

Tað er ikki bara ein heiður at vera høvuðsstaður. Tað hvílir eisini ein tung skylda á høvuðsstaðarheitinum. Sitandi samgonga hevur gjørt nógv burturúr at fríðka um býin. Sambandsflokkurin hevur havt formannin í byggi- og býarskipanarnevndini seinastu árini. Einamest er tað miðbýurin, sum hevur notið væl av hesum, og hetta kunnu so øll frøast um, hóast hetta arbeiðið ongantíð verður liðugt.

At fríðka um okkara høvuðsstað økir um trivnaðin hjá teimum, sum búgva her, men átti at verið til gleði fyri øll. Hetta arbeiðið skal sjálvandi halda fram, men nú skal eisini hugsast meira um útjaðaraøkini.

Tað er sera umráðandi, tá tað ræður um fríðkan, at hvør einstakur borgari tekur ábyrgdina saman við kommununi. Vit kenna øll hugtakið um at sópa fyri egnum durum.

Ung í arbeiði hava gjørt gøtur millum býlingar, og spælipláss eru gjørd og endurnýggjað. Og ætlanin er nú at koma longur út til teir ymsu býlingarnar við somu tiltøkum. Undir fríðkanina hoyrir eisini, at vegir verða hildnir reinir og vakrir.

Heilsubótarmiðstøð

Hans Biskopstø
valevni hjá Fólkaflokkinum

Fyri einum ári síðani var hugskot frammi um slíka støð inni á Sundi.

Frá aldagamlari tíð vita menn um, at tey mineralir, sum finnast í sjógvi, eru lekjandi.

Fyrr var eisini vanligt at nýta sjógv í heimaráðum til at lekja sjúkur av ymiskum slagi, so sum giktsjúkur, húðsjúkur o.a.

Gomlu rómverjarnir brúktu – og Miðalhavslondini brúka tann dag í dag – baðstovu við heitum sjógvi til at bøta um heilsuna.

At økið inni á Sundi er áhugavert, kemst av, at har liggur motorverkið hjá S.E.V. Og um tað tekniskt og økonomiskt letur seg gera at nýta spill- ella avlopshitan frá verkinum til uppthiting av baði við heitum streymasjógvi og gosbaði, so eru karmar skaptir fyri eini heilsubótarmiðstøð, sum antin kann leggjast inni á Sundi ella beint hinumegin fjørðin á Kaldbakslandinum.

Hetta er eitt stórmál, sum hugskotsstillarar og MBF arbeiða víðari við.

Býráðið og S.E.V. halda málið vera áhugavert og stuðla, at framhaldandi kanningar verða gjørdar. Her er talan um skilagóða nýtslu av spillorku til heilsubótandi endamál.

Fólkaflokkurin stuðlar hesum tiltaki.